# Útflutningurin av upsa gevur turr gólv á føroysku fiskavirkjunum

**Formaðurin í Føroya Ráfiskakeyparafelag, Andreas F. Hansen, fegnast um, at marknaðurin fyri frystum og saltaðum upsavørum er hampiliga góður í løtuni, og tí heldur hann, at grundarlagið hjá føroyskum fiskavirkjum at geva líkinda prís fyri upsan er hampiliga gott, soleiðis sum støðan er**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Andreas F. Hansen, formaður í Føroya Ráfiskakeyparafelag, vísir á, at upsafiskiskapurin í ár hevur verið rættiliga góður, og hetta er ein orsøkin til, at so nógvur upsi er landaður uttanlands í ár.

Hann sigur, at vanliga eru prísirnir bestir um heystarnar, og soleiðis er eisini í ár.

- Um várið, tá ið úrtøkan í fiskinum er munandi minni, eru prísirnir oftast eisini hareftir, og soleiðis var eisini í vár, tá ið torført var at keypa og virka upsa við líkinda úrsliti.

## Turr gólv

Formaðurin í ráfiskakeyparafelagnum ásannar, at landaðu nøgdirnar av upsa uttanlands eru rættiliga stórar, og hann ásannar eisini, at føroysku fiskavirkini seinastu nógvu mánaðirnar hava mangla upsa, sum hann tekur til.

Hann veit um fleiri virki, sum meira ella minni hava ligið í fiskaloysi, tí so nógvur upsi er farin av landinum, og hann nevnir eitt stutt tíðarskeið herfyri, tá ið heili túsund tons av upsa fóru av landinum í at kalla einum "rendi".

Andreas F. Hansen sigur, at tað serliga er franski marknaðurin, sum hevur keypt stórar nøgdir av upsa.

- Fransmenn fiska eisini upsa, men eisini hjá fiskimonnunum har hava prísirnir verið lágir. Tí eru menn givnir at fiska – ella hava lagt um til aðra veiði. Hetta hevur gjørt, at franski marknaðurin, sum er rættiliga stórur, hevur keypt nógvan feskan upsa úr øðrum londum og eisini úr Føroyum.

Hann vísir á, at franski marknaðurin vanliga er sjálvforsýnaður við upsa, men nú veiðan hjá fronskum fiskimonnum er minkað, vantar marknaðinum fisk.

Andreas veit eisini at siga, at fronsk upsaskip eisini fiska í Norðsjónum, og har hevur upsin verið uppaftur smærri enn fiskurin, sum fæst í føroyskum sjógvi.

- Annars er upsin betur til støddar nú, enn hann var fyrr í vár, og fiskurin er sum nevnt eisini nógv betur fyri hesa tíðina av árinum

## Fekst og fryst

Onkur hevur nevnt, at minkaða veiðan av alaska pollock eisini hevur ávirkað upsamarknaðin í Evropu, men her vísir Andreas á, at vit mugu skilja ímillum feskfiskamarknaðin og frysta marknaðin – ella saltfiskamarknaðin.

- Minkaða veiðan eftir alaska pollock ávirkar ikki feskfiskamarknaðin í Evropu, men hon kann hava ávirkan á marknaðin á frystum og saltaðum fiskavørum, sigur hann.

Formaðurin í ráfiskakeyparafelagnum fegnast annars um, at marknaðurin fyri frystum og saltaðum upsavørum er hampiliga góður í løtuni, og tí heldur hann, at grundarlagið hjá føroyskum fiskavirkjum at geva líkinda prís fyri upsan er hampiliga gott, soleiðis sum støðan er.

- Lítil toskur er á marknaðinum í løtuni, nú toskafiskiskapurin er so nógv minkaður, og næstan ómøguligt er hjá føroyskum fiskavirkjum at kappast við bretska marknaðin um hýsuna, sigur Andreas F. Hansen, formaður í Føroya Ráfiskakeyparafelag og virkisleiðari á Sandoy Seafood.



*Savnsmynd*



# Soleiðis fer sølan av Faroe Seafood fram

**Framtaksgrunnur Føroya tilskilar sær staðiliga rætt til at enda ella at broyta søluprosessina og at góðtaka ella vraka eitt og hvørt boð - uttan mun til, um hetta er hægsta ella ikki**

FAROE SEAFOOD
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í tíðindaskrivi í síðstu viku kunnaðu leiðslan í Framtaksgrunni Føroya og Faroe Seafood um, hvussu gongdin verður í sambandi við søluna av fyritøkuni, P/F Faroe Seafood.

Arbeiðið í sambandi við søluna, sum verður fyriskipað av Corporate Finance hjá KPMG í Keypmannahavn, verður skipað í trimum stigum.

## Fyrsta stig

Fyrsta stigið verður, at áhugaðir keyparar skulu seta seg í samband við Corporate Finance, sum eisini fer at seta seg í samband við úrvaldar keyparar heima í Føroyum og í útlandinum. Ein stutt lýsing av P/F Faroe Seafood og ein trúnaðaravtala verður útflýggjað. Allir keyparar fáa álagt at undirskriva trúnaðaravtaluna, áðrenn farið verður víðari og víðfevnda sølutilfarið, Information Memorandum (IM) viðvíkjandi Faroe Seafood verður útflýggjað.

- Við støði í IM verður væntað, at áhugaðir keyparar skrivliga sýna teirra áhuga í at keypa P/F Faroe Seafood við at geva eitt óbindandi indicativt boð, sum tað eitur, til Corporate Finance í seinasta lagi, 21. november 2005, siga Framtaksgrunnurin og Faroe Seafood.

## Næsta stig

Næsta stigið verður tikið við støði í innkomnum indicativu boðunum.

- Her velir Framtaksgrunnurin eitt avmarkað tal av keyparum at verða við í framhaldandi prossuni. Partarnir, sum verða útvaldir til 2. stig, fáa meira kunning um felagið í eini framløgu frá leiðsluni og fáa haraftrat atgongd til dátarúm og høvi at vitja á virkjunum. Fyri at halda fram í prosessini, mugu keyparar nú geva eitt endaligt og bindandi boð.

Næsta stigið byrjar stutt eftir, at fyrsta stigið er gjøgnumført.

## Triðja stig

Í triðja og seinasta stigi, verður støðið tikið í endaligu og bindandi boðunum, sum komin eru.

- Her velir Framtaksgrunnurin teir partar út, ið skulu verða við í endaligu samráðingunum, eini nágreiniligari gjøgnumgongd og formligari lokan av søluni, sum sagt verður.

Í tíðindaskrivinum verður dentur lagdur á, at Framtaksgrunnur Føroya staðiliga tilskilar sær rætt til at enda ella at broyta søluprosessina og at góðtaka ella vraka eitt og hvørt boð - uttan mun til, um hetta er hægsta ella ikki.

- Hetta tilskilar Framtaksgrunnurin sær rætt til í øllum nevndu stigum í søluprosessuni, siga Framtaksgrunnur Føroya og Faroe Seafood.

Tað eru nevndarformenninir í feløgunum báðum, Dagnar S. Joensen og Óli Hansen, sum hava undirskrivað tíðindaskrivið um, hvussu søluprosessin av P/F Faroe Seafood fer at fara fram.